COROLLA

TOYOTA



# Opið hús leygardagin...
## Kom niðan og royn ævintýrið

Eitt nýtt model av Corolla er komið. Í nærum ein mansaldur hevur hann á sín egna stilla hátt verið álitið hjá Toyota í Føroyum. Corolla í havódn og Corolla í stilli. Enn einaferð hevur verksmiðjan megnað at betra tað besta og samlað tað í ein familjubil. Kom og uppliv ævintýrið. Vit hava opið hús leygardagin 20. november, millum kl. 10.00 og 16.00



**Nýtt góðskustig**
Tann nýggi Corolla ber brá av framúr góðskustigi. Góðan aerodynamikk og ein umfatandi minking av larmi frá vegi og vindi. Sportsetur og ein fullkomin trygdarpakki boða frá gjøgnumgangandi nýhugsan í einum bili, ið hevjar seg eitt fitt petti upp um aðrar.

**Mjáður og rúmligur**
Hóast hann sýnist sum ein lítil bilur, er ikki smávegis av plássi. Fimm fólk sita væl virðiliga og her er eisini ríkiligt av rúmum, har tú kanst seta okkurt frá tær. Baksetrini kunnu leggjast niður í tveimum, soleiðis at viðførisrúmið gerst risastórt.

**Fleiri snið**
Corolla fæst í trimum sniðum. Hatchback, sedan og stationcar. Felags fyri øll trý sniðini er afturvendandi góðskustigið, ið sermerkir bilin frá innast til uttast. Ein røð av valmøguleikum eru tá tað ræður um motorar. Tú velur bara eftir tínum egna sinnalagi.

**Nr. 1 í nøgdsemi**
Í Týsklandi liggur Toyota Corolla sum nr. 1 – triðja árið á rað - í kundanøgdsemiskanningini hjá JD Power and Associates.
Kanningin byggir á svaraðar spurningar frá yvir 24.000 eigarum av tvey ára gomlum bilum.
Eigararnir vóru bidnir um at svara fyri nøgdsemi og kostnaðum av at røkja bilin.

Tú ert altíð vælkomin niðan á Reyni Service at royna bilin. Tak familjuna við og fá vissu fyri at tit trívast í hesum rullandi undurverkinum. Vit bjóða eisini fíggingarmøguleikar, men alt tað, kunnu vit tosa um tá tit hava tikið eina avgerð.

**Prísur úr kr. 196.600,-**

Vegurin Langi · Hoyvík · Tel. 353040 · Fax 353041
rs@reyniservice.fo · www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F


# Avlopið minkað 3/4 milliard

**Síðani ár 2000 er samlaða avlopið hjá føroyskum vinnufyritøkum minkað úr 718 mió kr. til eitt minus á 32 mió kr.**

ROKNSKAPIR
*Jákup Mørk*

Hetta vísir ein uppgerð, sum Hagstovan hevur gjørt. Grundarlagið undir uppgerðinunum er eitt stórt tal av roknskapum, valdir út við eini umfatandi stakroynd millum allar vinnufyritøkur. Fíggjarfyritøkur og einstaklingarvirki eru ikki við í tilfarinum.

Samanlagda ársúrslitið hjá vinnufyritøkunum í fjør, vísti eitt hall upp á góðar 30 mió. kr. eftir skatt. Árini frammanundan royndust nógv betri. Í 2002 høvdu vinnufyritøkurnar eitt rakstraravlop upp á 405 mió. kr. og í 2001 var avlopið 701 mió. kr. Tey seinastu seks árini var 2000 besta árið, tá úrslitið var 718 mió. kr. í avlopið.

Úrslitið hevur í stóran mun verið merkt av vánaligu støðuni í alivinnuni. Í 2003 var halli í alivinnuni umleið 550 mió. kr. Alivinnan hevði eisini hall í 2002 og 2001 sum var ávikavist 278 og 20 mió. kr. Verða hugt at teimum trimum høvuðsbólkunum, t.v.s. tilfeingisvinnuni, vøruframleiðsluvinnuni og tænastuvinnuni, so framgongur, at tað er ógvuliga ymiskt, hvussu vinnurnar hava staðið seg.

Tilfeingisvinnan, sum umframt alivinnuna umfatar landbúnað, fiskiveiðu og ráevnisvinnu, hevði í 2003 eitt hall, sum tilsamans var 502 mió. kr. Frægasta úrslitið seinastu seks árini var í 2000, tá avlopið var 309 mió. kr.

Vøruframleiðsluvinnan, t.v.s. ídnaður, orkuframleiðsla og byggivinna hevði avlop í 2003, sum var 171 mió. kr. Árið frammanundan var avlopið 198 mió. kr., og í 2001, sum hevði frægasta úrslitið seinastu seks árini, vóru 202 mió. kr. í avlopi.

Tænastuvinnan, sum umfatar handil, flutning, samskifti og aðrar handilsligar tænastur, hevði í 2003 eitt avlop upp á 298 mió. kr. Í 2002 var avlopið 307 mió. kr. og í 2001 329 mió. kr., sum eisini var frægasta úrslitið seinastu árini.

Viðmerkjast skal, at úrslit av kapitalpørtum ikki er við í rakstrarúrslitinum hjá fyritøkunum, sí frágreiðing um hagtalslýsing av vinnuhagtølum.

*kelda: www.hagstovan.fo*


# Skrivstovuhjálp
## til Pf. Vágatunnilin

Vágatunnilin sóknast eftir skrivstovufólki beinanvegin. Starvið er tíðaravmarkað til endan á august 2005. Arbeiðið fevnir um vanligar skrivstovuuppgávur við serligum atliti til innkrevjing.

Fólk, ið hava skrivstovuútbúgving, handilsútbúgving ella líknandi, og fólk ið eru von at starvast á skrivstovu, kunnu søkja.

Løn og setanartreytir annars verða ásettar eftir nærri avtalu. Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Dávid Reinert Hansen á telefon 350 200 ella við at senda teldubræv til drh@tunnil.fo.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi týsdagin 23. november 2004. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.



Vinarliga sendið umsóknina til:

**Vágatunnilin p/f**
**Postboks 1010**
**110 Tórshavn**

VÁGATUNNILIN

Vágatunnilin pf. · Skansavegur 7 · Postboks 1010 · 110 Tórshavn · Tel 350200 · Fax 350201
www.tunnil.fo



Oyri og Oyrarbakki

# Útbjóðing

Við hesum verður partur av arbeiðinum at breiðka vegin millum Oyrarbakka og Oyri og at gera omankoyring til bátahylin á Oyrarbakka boðið út í almenna lisitatión. Arbeiðið fevnir um avgrevstur av mold og uppfylling við gróti, og skal hetta verða liðugt í seinasta lagi 31. desember 2004.

**Høvuðsnøgdirnar eru umleið:**
Avgrevstur av mold 2.500 m3
Uppfylling við gróti 6.000 m3

Lisitatiónin verður hjá Landsverki, Tinghúsvegi 5, Tórshavn,
**týsdagin 23. november 2004, kl. 15.00.**

Ástaðarfundur verður mánadagin 22. november 2004, kl. 13.00.

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast frá 18. november 2004 til í seinasta lagi 19. november 2004, kl. 15.00, og verður útflýggjað móti einum veðhaldi til støddar 2.000 kr., ið verður at flyta á konto nr. 128.229.6 í Føroya Sparikassa ella á konto nr. 431.468.0 í Føroya Banka. Veðhaldið verður afturgoldið, um útbjóðingartilfarið er aftursent óskalað í seinasta lagi eina viku eftir lisitatiónina.

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land



# Útbjóðing

Vi hesum verður partur av arbeiðinum at breiðka vegin millum Streymnes og Brúnna um Streym, boðið út í almenna lisitatión. Arbeiðið fevnir um avgrevstur av mold og uppfylling við gróti og skal hetta verða liðugt í seinasta lagi 31. desember 2004.

**Høvuðsnøgdirnar eru umleið:**
Avgrevstur av mold 12.000 m3
Uppfylling við gróti 13.000 m3

Lisitatiónin verður hjá Landsverki, Tinghúsvegi 5, Tórshavn,
**týsdagin 23. november 2004, kl. 11.00.**

Ástaðarfundur verður mánadagin 22. november 2004, kl. 10.00, og møtt verður við húsið hjá Landsverki við Streymin.

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast frá 17. november 2004 til í seinasta lagi 19. november 2004, og verður útflýggjað móti einum veðhaldi til støddar 2.000 kr., ið verður at flyta á konto nr. 128.229.6 í Føroya Sparikassa ella á konto nr. 431.468.0 í Føroya Banka. Veðhaldið verður afturgoldið, um útbjóðingartilfarið er aftursent óskalað í seinasta lagi eina viku eftir lisitatiónina.

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land